# – Eg havi ongantíð fu

**– Verkfallið í 1987 er tað ringasta, eg havi verið úti fyri, tí tá ringdu ókend fólk til mín fleiri ferðir hóttu við øllum møguligum, sigur Ingeborg Vinther, sum nú hevur verið forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag í heili 25 ár**

25 ÁRA HÁTÍÐARDAGUR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Viðhvørt lagar lívsleiðin seg øðrvísi enn nakar hevði droymt um.

Tað má ikki minst Ingebog Vinther í Vági ásanna.

Hóast hon hevði fingið fakfelagspolitikk inn við móðurmjólkini, hevði hon ongantíð ætlað sær uppí fakfelagsarbeiðið.

Men tey, sum hava fylgt við hendan seinasta mansaldurin, vita, at tað skuldi ganga øðrvísi.

Ingeborg Vinther bleiv ikki bara fakfelagsleiðari. Hon bleiv eisini ein tann litríkasti og týdningarmesti fakfelagsleiðarin í Føroya søgu. Hon hevur nú verið forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag í heili 25 ár og tað er longri enn nakar annar.

Ingeborg Vinther kom í nevndina í Føroya Arbeiðarafelag í 1977. Men longu á aðalfundinum í 1980 bleiv hon vald til formann, tá ið Johannes Olsen úr Sandavági ikki stillaði uppaftur.

Og tað arbeiðið hevur hon megnað so væl, at síðani hevur ongantíð verið ivi um, hvønn limirnir í Føroya Arbeiðarafelag vilja hava til formann, tí hvørja ferð, hon hevur staðið fyri vali, hevur hon fingið so dygga álitisváttan frá fundarfólkinum, at hon hevur ongantíð so mikið sum havt eitt mótvalevni og enn hevur so ongin bjóðað henni av.

Tá ið hon kom í nevndina í Føroya Arbeiðarafelag var hon púra fesk í fakfelagspolitikki. Hon hevði verið nevndarlimur í Arbeiðskvinnufelagnum Fjallbrúður í heimbygdini Vági í umleið eitt ár.

– Tað var púra av tilvild, at eg bleiv virkin í fakfelagspolitikki, sigur Ingeborg Vinther.

Hon sigur, at hon plagar at vera á fundi í Fjallbrúður, har hon varð limur. Og tað kann neyvan koma óvart á nakran, at hon forsømdi ikki at siga sína hugsan um tey mál, sum vóru frammi í kjakinum. Og í Føroyum er tað soleiðis, at tey tey, sum ditta sær at siga sína meining á fundum, enda skjótt í nevnd. So tað gjørdi Ingeborg Vinther eisini.

Tá varð lívsleiðin hjá Ingeborg Vinther løgd, tí vegurin úr Fjallbrúður inn í Føroya Arbeiðarafelag tók bara eitt ár.

Annars kundi tað ikki undra nakran, at júst Ingeborg Vinther gjørdust virkin í fakfelagspolitikki.

– Eg eri uppvaksin í heimum heimi, har tað bleiv tosað nógv um fakfelagspolitikk. Bæði pápi mín og systkin hansara vóru virkin fakfelagsfólk í nógv ár og pápi mín var stjórnarlimur í Føroya Arbeiðarafelag í eini 10 ár. Og fastur mín var við til at stovna Arbeiðskvinnufelagið Fjallbrúður í síni tíð.

– Hetta var tá ið føroyska fakfelagsrørslan traðkaði sínar barnaskógvar og stór og grundleggjandi mál vóru at taka støðu til. Ágangurin á feløgini var øgiligur og stríðið var mangan hart. Tí var eyðsæð, at tá ið so nógv av mínum næstringum vóru virkin fakfelagsfólk, var hetta nakað, sum fylti nógv í okkara heimi.

## Bara vaksið og vaksið

Ingeborg Vinther sigur, at hesi 25 árini, hon hevur verið forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag, er fakfelagsarbeiðið broytt so nógv, at tað er ikki at kenna aftur.

– Tá ið eg bleiv forkvinna, varð skrivstovan opin tveir dagar um vikuna. Og vit vóru bara tvey fólk á skrivstovuni, eg sjálv og ein kassameistari. Tá vóru nevndarfundir eisini bara einar tvær ferðir um árið.

– Nú er skrivstovan opin hvønn dag, og vit eru fýra fulltíðarstørv í felagnum. Og nevndarfundir eru hvønn mánaða, onkuntíð uppaftur oftari.

Ingeborg sigur, at eitt, sum er nógv vaksið hesi seinastu árini, er samstarvið við fakfeløg og felagsskapir uttanlands. Men eisini hevur samstarvið ímillum fakfeløgini í Føroyum ment seg nógv.

Í dag eru uppgávurnar hjá Føroya Arbeiðarafelag eisini nógv vaksnar.

– Fyrr var tað at kalla bara krónur og oyru, tað snúði seg um. Í dag snýr tað seg sjálvandi eisini um krónur og oyru, men arbeiðsumhvørvi, sosialar skipanir, trygd og trivnaður á arbeiðsplássum, hevur eisini alstóran týdning hjá fakfeløgum nú á døgum.

## Hart at fáa líkaløn

Ingeborg Vinther sigur tá ið hon kom upp í Føroya Arbeiðarafelag, var tann stóra avbjóðingin at útvega konufólki somu tímaløn sum mannfólkini.

– Tá fingu mannfólk ímillum tvær og tríggjar krónur meiri um tíman, enn konufólk fingu fyri sama arbeiði.

– Hinvegin fingu konufólk fulla løn tá ið tey vóru 16 ár, men mannfólk fingu ikki fulla løn, fyrrenn tey vóru fylt 17 ár. At fáa javnstøðu á hesum øki varð raðfest fremst tað fyrstu ferðina eg var við í sáttmálasamráðingum í 1977.

– Fleiri arbeiðarafeløg samráddust saman og hetta vórðu harðar samráðingar, tí summir arbeiðsgevarar vildu ikki hoyra talan um, at gjalda konufólki somu løn sum mannfólki, tí tað høvdu teir, sum vant, ikki ráð til.

Men Ingeborg Vinther sigur, at heilt óvæntað var eisini hørð mótstøða ímóti hesum í sjálvari fakfelagsrørsluni.

– Ikki minst vóru nógv mannfólk ímóti, at konufólk skuldu fáa líka høga løn, sum teir. Teir vóru samdir við arbeiðsgevarunum í at tað var órímiligt, at konufólk skuldi fáa líka nógva løn sum mannfólk, tí tey arbeiddu ikki tað sama og vóru ikki líka sterk og orkaðu tí ikki so væl at lyfta.

Jógvan Sundstein var semingsmaður tá og tað endaði við, at hann legði eitt uppskot fyri partarnar, sum segði, at lønin skuldi útjavnast so líðandi, so at øll fingu somu løn í 1981.

Hinvegin skuldu konufólk ikki fáa fulla løn, fyrrenn tey vóru 17 ár, akkurát sum mannfólkini.

Ingeborg Vinther sigur, at Jógvan Sundstein gjørdi eitt megnar arbeiðið fyri at sannføra allar partar um, at tíðin var farin frá, at munur skuldi vera á lønunum hjá mannfólki og konufólk og tað endaði eisini við, at allir partar góðtóku tað.

Ingeborg Vinther sigur, at hetta er ein av teimum stóru



sigrunum hjá arbeiðarafeløgunum ta tíðina, hon hevur verið uppií.

## Hótt við einum og øðrum

Ein annar stórur sigur, var úrslitið av tí óvanliga drúgva og harða verkfallið í 1987.

– At felagið kom heilskapað ígjøgnum tað verkfallið, sum vardi í heilar tríggjar vikur, sigur eitt sindur um styrkina í feklagnum og seiggi í arbeiðsfólki kring landið.

Hon sigur, at verkfallið snúði seg um, at Arbeiðsgevararnir betaltu 1 % av lønini í ein eftirlønargrunn hjá Havnar Arbeiðsmannafelag.

– Tá ið okkara tørn var fyri, kravdu arbeiðsgevararnir at fáa ávirkan á, hvussu vit brúktu hetta eina prosentið, og teir kravdu at fáa umboð í nevndina, sum skuldi umsita ein eftirlønargrunn og ávirkan á, hvussu okkara skipan skuldi vera.

– Hetta bleiv eitt prinsippmál fyri Føroya Arbeiðarafelag, tí arbeiðsgevarar skuldu ikki leggja seg út í innanhýsis viðurskifti hjá okkum og teir skuldu ikki blanda seg uppí, hvussu vit snikkaðu eina sosiala skipan sama.

– Tað endaði í verkfalli, sum vardi í samfullar tríggjar vikur. Minniligast frá tí verkfallinum, er at Oyggjarvegurin var avbyrgdur í Kollafjarðardali.

Ingeborg Vinther sigur, at hetta tað harðasta verkfallið hon hevur verið við í.

– Eisini heilt personliga var hetta verkfallið hart og tað kostaði nógvar svøvnleysar nætur.

Hon sigur, at hesa tíðina hendi tað ferð eftir ferð, at dulnevnd fólk ringdu til hennara allar tíðir á døgninum, eisini um náttina, og brúkti skitin orð ímóti henni.

– Eg varð eisini meiri enn einaferð beinleiðis hótt, enntá við lívinum.

Men hon sigur, at hesar hóttanirnar rinu ikki við.

– Eg eri ísakøld fyri slíkum. Eg havi ongantíð funnið meg í hóttanum og sovorðnum havi eg ongantíð lurta eftir, tí fólk, sum finna uppá slíkt, eru ikki við síni fullu fimm.

– Tað var undrunarvert, at tey ymsu arbeiðarafeløgini megnaðu at standa so væl saman í hesum verkfallinum. Tá vóru tað ikki øll feløgini, sum høvdu verkfalsgrunn, so hjá nógvum húskum stóð nógv ár, tí hetta var eitt øgiligt,